FYLGISKJAL LM-064/2022

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Barna- og Útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 7
FO-110 Tórshavn

Staður: Tórshavn, 06.02.2023
J. nr. (MEGD): 701-1-2023
Ummælistíð: 06.02.2023
J.nr (BUMR).: ikki upplýst í uppskoti

Hoyringarskriv viðvíkjandi

Uppskot til løgtingslóg

um at um- og útbýggja eftirskúlan Rásin

MEGD vil fyrst takka fyri høvið at senda hoyringarskriv til nevnda uppskot.

1. MEGD fegnast um at uppskotið hevur til endamáls at heimilað landsstýrismanninum at skipa fyri, at eftirskúlin Rásin verður umbygdur og útbygdur. Byggiútreiðslurnar í hesum sambandi kunnu vera í mesta lagi verða 25 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

2. MEGD vil fyrst og fremst gera vart við at hoyringartíðin er alt ov stutt. Uppskotið varð sent til hoyringar fríggjadagin í síðstu viku, og freistin at senda viðmerkingar er í dag kl. 12:00. Talan er sostatt um nakrar fáar arbeiðstímar, sum er alt ov lítið. Ynskiligt hevði verið, um MEGD, og limafeløgini, høvdu 4 vikur at senda hoyringarskriv.

3. Høvuðsendamálið hjá MEGD er at umboða áhugamálini hjá fólki, ið bera brek, og at lógir og átøk samsvara við altjóða Brekrættindasáttmálan.[1] Til tess at røkka hesum endamáli krevst luttøka, samskifti og samstarv við fólk, ið bera brek, avvarandi teirra og til tíðir aðrar partar, eitt nú starvsfólk ella serfrøðingar. MEGD metir tískil, at tað er greitt brot á Brekrættindasáttmálan,

[1] Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. LM-162/2008. Skjal 1.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

at hetta lógaruppskotið einans er til hoyringar í nakrar fáar arbeiðstímar.

4. MEGD hevur ikki sæð narka tekning ella skitsu av byggiverkætlanini, og hevur tí einans tekstin í uppskotinum at taka støðu til. MEGD vil tískil vísa á, at byggiverkætlanin eigur at verða skipað og tillagað á rímuligan hátt, soleiðis at brúkarar, ið bera brek, fáa ein virðiligan og virknan gerandisdag. Víst verður fylgjandi hugtøk sambært grein 2 í altjóða Brekrættindasáttmálanum:

   - hugtakið "rímiligar tillagingar" at skilja sum neyðugar og hóskandi broytingar og tillagingar, sum ikki leggja órímiliga stóra ella óneyðuga byrði á, har tað í ávísum førum er neyðugt, til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at fáa og brúka øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi javnbjóðis øðrum;

   - hugtakið "algilt snið" er at skilja sum snið á vørum, umhvørvi, skipanum og tænastum, sum øll fólk kunnu nýta mest møguligt uttan at tillaginar og serskilt sniði eru neyðug. "Algilt snið" forðar ikki fyri at útvega hjálpartól til fólk við ávísum breki, tá ið tørvur er á teimum.

5. MEGD vil vísa á, at umframt at tað er meira virðiligt fyri brúkarar og avvarðandi teirra, at royndir vísa, at tað eisini loysir seg fíggjarliga, at tryggja, at fólk, ið bera brek, verða tikin við í byggiverkætlanirnar, bæði undir fyrireikingunum, undir sjálvari byggingini og til verkætlanin er borin á mál. Alt hetta eigur sjálvandi at verða gjørt á rímuligan hátt.

6. Víst verður til dømir um byggiverkætlanir (*Handicaporganisationernes Hus* hjá Danske Handicaporganisationer (DH)), har tað als ikki kostaði nakað *eyka* at byggja við góðari atkomu, nevniliga tí at brúkarar vóru indrignir á skynsaman og rímuligan hátt.

7. Í kapituli 2 í uppskotinum, verður mett at uppskotið neyvan hevur tær stóru avleiðingarnar. MEGD metir at grundarlag er ikki fyri at gera dygdargóðar og neyvar niðurstøður um, hvørjar avleiðingar uppskotið hevur fyri fólk, ið bera brek ella avvarandi teirra, um hesi ikki hava verið hoyrd á rættan og rímuligan hátt.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

8. Hetta merkir millum annað, at hvørki myndugleikar ella feløg kunnu hava nøktandi grundarlag at staðfesta fylgjandi:

   - Um uppskotið samsvarar við altjóða Brekrættindasáttmálan (sum punkt 2.8 annars staðfestir.)
   - Um uppskotið hevur avleiðingar fyri fólk, ið bera brek. (sum punkt 2.6 annars staðfestir.)
   - Um uppskotið hevur avleiðingar fyri umsitingar hjá landi ella kommunum. (sum punkt 2.2 annars staðfestir.)

9. Punkt 1.5 staðfestir at uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Rásini, Landsverk og Fíggjarmálaráðnum. MEGD hevði ynskt at bæði MEGD og limafeløgini hjá MEGD høvdu fingið betri høvið at viðmerkt, og vóru virðiliga inndrigin í hoyringina.

10. MEGD vil gera vart við, at tað hevur stóran týdning, at gerandisdagurin hjá luttakarum á Rásini verður væl skipaður, og at hann ikki fer at bera eyðkenni av *institutionalisering/stovnsgerð*, sum kann hava sera neiliga ávirkan á lívsgóðsku, heilsu, trivnað og menning hjá fólki, ið bera brek og avvarandi teirra. Til tess at basa vandum fyri institutionalisering, er neyðugt við góðum samstarvi við viðkomandi áhugafelag hjá fólki, ið hava menningartarn.

11. MEGD vil gera vart við at eingin yvirskipað lóggáva er í Føroyum, tá tað kemur til byggiverkætlanir til fólk, ið bera brek. Ein slík lóggáva eigur at verða gjørd skjótast gjørligt, millum annað soleiðis at tað verður gjørligt at upparbeiða servitan, kunnleika og førleikar, umframt at meira orka verður sett av til at skipa verkætlanirnar í samstarvi við áhugafeløg.

12. MEGD hevði ynskt at havt umstøður at skriva fleiri viðmerkingar, men orsaka av alt ov stuttari hoyringartíð, ber tað tíverri ikki til.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

13. Føroya Blindafelag vil eisini minna á, at fleiri ung eru í samfelagið okkara, sum hava menningartarn og sjóntrupuleikar , so tað er sera viðkomandi at gera hendan skúlan atkomuligan fyri øll, sum bera brek og, sum koma undir hendan bólkin við menningartarni.

    Tað skal helst ikki verða ein forðan fyri ein ungan persón við meningartarni, men, sum eisini hevur sjóntrupuleikar, at ynskja sær upptøku á Rásini, vegna væntandi atkomu.

    Ein sannroynd er, tíverri, at vit uppliva, nærum við øllum um- og nýbyggingum, at júst at koman fyri blind og sjónveik ikki verur komin í tankar um fyrenn bygningar, meira ella minni eru klárir at taka í brúk og tá verða inntrivini nógv størri, enn um vit í byrjanini verða tikin við uppá ráð, tí vit eru altíð klár við vegleiðing á hesum sera týdningarmikla økinum.

14. Síðani 2015 hava fleiri tekningar verið gjørdar, og verkætlanin hevur verið broytt í fermetrum úr 650 niður í 450 fermetrar. Ymiskir prísir hava eisini verið mettir. Hvussu verður nú tryggjað, at 25 mió. í 2023 er nøktandi upphædd fyri útbyggingina, har ein lutfalsliga stórur partur sjálvsagt fer til trygdarkrøv og góða atkomu, tí jarðarmunurin er stórur. Her saknar MEGD gjøgnumskygni.

Vinaliga vegna MEGD,

Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo